ELEKTRON

# Teknikari til Tænastudeildina

Vit sóknast eftir einum teknikara til verkstaðið í Tænastudeildini.
Starvið umfatar fjølbroyttar viðlíkahalds- og stuðulsuppgávur í víðøkisnetinum og á staðnum, m.a.:

- Innlegging av stýriskipanum
- Uppseting av teldum
- Røkt av útgerð hjá kundum okkara og hjá Elektron
- Umvæling á IBM-góðkendum verkstaði

Vit vænta
at tú hevur hegni til telduarbeiði á tekniskum stigi, at tú setur teg skjótt inn í nýggjar skipanir og útgerð og dámar væl nýggjar avbjóðingar.
Vit leggja harumframt dent á, at tú dugir - og at tær dámar - at veita kundavinarliga tænastu á høgum støði.

Tað er ein fyrimunur um tú hevur eina tekniska útbúgving, t.d. datamekanikari, elektronikkmekanikari e.l.. Starvsroyndir við telduarbeiði í netumhvørvið er eisini ein fyrimunur.

Tú mást duga bæði at arbeiða sjálvstøðugt og í bólki. Tú mást sum persónur megna at hava fleiri bóltar í luftini í senn og vera fyrireikaður uppá, at viðhvørt er neyðugt at arbeiða undir ávísum trýsti og uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Vit bjóða
- Eitt spennandi og avbjóðandi starv við dugnaligum og beinasomum starvsfeløgum.
- Góðar útbúgvingarmøguleikar.
- Løn eftir førleika.

Um tú vil vita meira
Ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jógvan Olsen, deildarleiðara, á telefon 31 45 05 ella á telduposti jogvano@elektron.fo.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 9. apríl 2001, og skulu stílast til P/F Elektron, Staravegur 9, 100 Tórshavn.

P/F Elektron er edv-veitari til almennar stovnar, peningastovnar, tryggingar og grunnar. Vit veita nærum allar tænastur innan edv til kundar okkara, herímillum kanningar av ymiskum tekniskum og handilsligum viðurskiftum, skipanarmenning og rakstur av edv-skipanum.

Størstu partaeigarirnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsstýri.

PF ELEKTRON
STARAVEGUR 9 · P.O. BOX 219
FO - 110 TÓRSHAVN
TEL.: +298 314505 - FAX: +298 316384
e-mail: info@elektron.fo

stephanssons hús



Vilja tygum við Í Býin
- hvønn hósdag






# Sig okkum frá

Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.
Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.
Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.
Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20.
Telefax nr. 31 47 20.
Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07.
Eisini ber til at senda teldupost til:
edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo



Sosialurin

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo




Nr. 23 15. mars 2001

## Kunngerð um tiltøk til fyribyrging av munn- og kleyvasótt

Við heimild í § 9, stk. 3, í løgtingslóg nr. 16 frá 23. februar 2001 um fyribyrging og niðurberjing av sjúkum hjá djórum og um marknaeftirlit við djórum og djóraúrdráttum (djórasjúkulógini), verður ásett:

**§ 1.** Ikki er loyvt at flyta inn livandi kleyvdýr og úrdráttir úr kleyvdýrum úr Stórabretlandi og øðrum londum ella umráðum, har munn- og kleyvasótt hevur tikið seg upp.

**§ 2.** Ferðafólk og manning, sum koma við flogfari ella skipi úr Stórabretlandi og øðrum umráðum, har munn- og kleyvasótt hevur tikið seg upp, skulu, tá tey koma til føroyska havn ella lufthavn, sóttreinsa fótbúnaðin í einum fótabaði við 1,0% sitrónupploysing ella øðrum sóttreinsingarevni, sum er egnað til endamálið.
*Stk. 2.* Havna- og flogferðslumyndugleikar skulu síggja til, at fótabað og sóttreinsingarevni eru tøk og verða nýtt.

**§ 3.** Akfør, sum koma úr Stórabretlandi og øðrum londum ella umráðum, har munn- og kleyvasótt hevur tikið seg upp, skulu, tá tey koma í føroyska havn, hava hjól, skermar og skermaop sóttreinsað við 0,2% natriumhydroxyd upploysing (NaOH) ella øðrum egnaðum sóttreinsingarevni.
*Stk. 2.* Havnamyndugleikar skulu síggja til, at akførini verða sóttreinsað.

**§ 4.** Matvøra og matvøruleivdir frá flogførum og skipum, sum hava provianterað í Stórabretlandi ella øðrum londum ella umráðum, har munn- og kleyvasótt hevur tikið seg upp, skulu ikki verða tikin í land í Føroyum uttan so, at tey beinanvegin verða send til burturbeiningar (brenning) í lufttættari bingju.
*Stk. 2.* Havna- og flogferðslumyndugleikar skulu syrgja fyri, at neyðuga talið av bingjum er tøkt, og at matvørur og matvøruleivdir verða burturbeind (brend).

**§ 5.** Ferðafólk og manning mugu ikki hava djóraúrdráttir til egna nýtslu við sær, tá tey koma til Føroya.
*Stk. 2.* Ferðafólk og manning, sum koma við flogfari ella skipi úr Stórabretlandi og øðrum londum ella umráðum, har munn- og kleyvasótt hevur tikið seg upp, skulu ikki koma í samband við kleyvdýr fyrstu 3 samdøgrini, eftir at tey eru komin til Føroya.
*Stk. 3.* Fólk, sum hava vitjað húsdýrabrúk í Stórabretlandi og øðrum londum ella umráðum, har munn- og kleyvasótt hevur tikið seg upp, skulu, tá tey koma til Føroya, seta seg í samband við Landsdjóralæknan beinanvegin (tlf. +298 322600 ella +298 211311) so gjørt kann verða av, um tað í teim einstøku førunum er neyðugt við serligum tiltøkum.

**§ 6.** Um tað gerst neyðugt, gevur landsstýrismaðurin landsdjóralæknanum loyvi til at áseta strangari tiltøk til at minka um vandan fyri, at munn- og kleyvasótt kemur higar úr Stórabretlandi ella øðrum londum, har sóttin hevur tikið seg upp.

**§ 7.** Brot á §§ 1–5 verða revsað eftir reglunum í lógini um djórasjúkur.

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr aftur gildi 30. juni 2001.

Vinnumálastýrið, 15. mars 2001

**Bjarni Djurholm (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)


# MANNING

Hervið verður søkt eftir **manning** til M/F Norrönu, til summarsiglingina 2001, sum byrjar 19. mai




Størvini, ið sett verða, umfata allar deildir innan catering so sum:

Pursarar, kokkar, bakarar, sleiparar, barrfólk, cafeteriafólk, tænarar, kioskgentur, koytugentur og informatiónsgentur.

**Fylgjandi krevst:**
- **Heilsuprógv** fyri sjófólk, ikki eldri enn 2 ár.
- **Trygdarskeið,** prógv í nýtslu av bjargingarútgerð.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**P/F SMYRIL LINE**
Postboks 370
FO-110 Tórshavn



JÄSPI KETLAR

Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu



**Bæði dupultir og einkultir**

Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð.
Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.

- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum

MARIA POULSEN & CO
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000



GRAVSTEINAR




GRAVPLÁTUR
KANTSTEINAR
BLÓMUKASSAR
LAMPUR



**Fa. GRAVSTEINAR**
Velbastaðvegur 45 • Boks 336 • 110 Tórshavn
Tel 32 03 70 • Fax 32 14 70
eftir arb.tíð: Tel 31 38 96 • Fartel 21 42 70



# Øll seymiáhugaði

Opið hús verður í Seymiskríninum:

Fríggjadagin 23. mars kl.10 - 18
Leygardagin 24. mars kl.10 - 16

Har Conny Müller og Hans Norman frá Husqvarna Viking vísa fram seymimaskinur og teir hentleikar teldan og seymimaskinan geva okkum í felag. Møguleikarnir er óteljandi



Komi og verði við! Høvið verður at spyrja um alt innan seyming.

SEYMISKRÍNIÐ
Dr. Jakobsensgøta 16 • Box 320
110 Tórshavn • Tel 31 40 05

Sosialurin - 311820